

*Tunnil í Dover í Suðuronglandi. Einsrættað ferðsla við ljósregulering er í tunlinum, soleiðis at tað skiftivís er grønt ella ella reytt hvørjumegin tunnilin*

# Ljósregulering kundi loyst ferðslutrupulleika

**Eins og nógva aðrastaðni hava ferðslumyndugleikarnir í Dover í Suðuronglandi loyst ferðsluna í einum gomlum tunli við ljósregulering. Hetta hevði verið ein góð loysn til tunlarnar á Borðoynni, sigur Sámal Bláhamar, ferðaleiðari**

FERÐSLA

Í mun til tunlarnar sum verða gjørdir í dag, eru gomlu tunlarnir, sum vóru gjørdir fyri umleið 40 árum síðan, als ikki tíðarhóskandi longur, sigur Sámal Bláhamar frá ferðamannastovuni Tora Tourist Traffic, sum hvørt summar skipar fyri útferðum fremmandum ferðafólkum kring landið.

Hann nevnir sum dømi, at um tveir 12 m langir bussar fara útferð til Viðareiðis og møta einum ella tveimum stórum akførum inni í einum av tunlunum, er tað ein sera torfør uppgáva hjá bussførarunum at mannerera. Tunlarnir er smalir og myrkir, og við fleiri stórum akførum verður nógvur osi frá útstoytunum, tá er skjótt at panikkur kemur í ferðafólkini, tey kenna seg innistongd og fáa klaustrofobi. Har er jú als eingin bjargingarútgerð og hvørki ljós ella telefon.

Akkurát hvussu hesin trupulleiki kann loysast, veit hann ikki. Tað kundi t.d. verið gjørt við eini kontakt við einum knøtti at trýsta á, tá bilførararnir koma til tunnilsmunnan, eins og á fótgangarateigunum ella at eitt ferðsluljós skifti fyri hvørjar 10 minuttir. So var møtingartrupulleikin inni í tunlunum loystur.

Nú Norðoyatunnilin er komin, hava bilførararnir betri stundir - eingin ferja er at skunda sær til. Teir minuttirnir bilførarnir missa við at bíða við ljósreguleringina, verða í stóran mun vunnir aftur, tá eingin mótkoyrandi ferðsla er í tunlunum, sigur Sámal Bláhamar.

## 60.000 klipp í koyrikortið

**Síðan skipanin í Danmark við at klippa í koyrikortið hjá bilførarum fyri ymisk lógarbrot í ferðsluni kom í gildi í september í fjør, er ferðin á vegunum minkað, men lógarbrotini eru framvegis nógv**

FERÐSLA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*




60.000 klipp upp á 10 mánaðir – ella tað sum svarar til umleið 197 klipp hvønn dag, eru givin donskum bilførarum í tíðarkeiðnum frá 1. september 2005 til 30. juni 2006.

Har afturat hava 109 bilførarar koyrt so skjótt, at teir máttu lata koyrikortið inn og lata bilin standa, til teir høvdu staðið nýggja koyriroynd.

Tað eru sum oftast teir ungu bilførararnir sum mugu upp til nýggja koyriroynd. Hetta kemur fyri ein part av, at hjá teimum sum einans hava havt koyrikort í trý ár, skulu einans tvey klipp í koyrikortið fyri at bilførarin skal til nýggja koyriroynd, skrivar Jyllands-Posten.


## Nissan Almera 1,6



Ein væl hildin Nissan Almera 1,6 til sølu vegna flyting.

Árg. des 1996, km. 168.000, sýnaður í des. 2005

Bilurin hevur 18" alu-felgur við nýggjum dekkum. Nýggj kavadekk á felgum fylgja við.

Prísur: kr. 45.000,-

**Tel. 216014 eftir kl. 17.00**

## Stásiligt ellisakfar til sølu



Bentley S II, árg. 1960 við V8 motori og automatiskum girum til sølu um hóskandi boð fæst.

Bilurin er væl útgjørdur og í sera góðum standi. Er væl egnaður til brúðarkoyring og onnur hátíðarlig endamál.

Áhugaði kunnu venda sær til

**Tel. 210877 ella 332877**

- **Umvæling av tryggingarskaðum og privat skaðum**
- **Vit umvæla øll bilmerki**
- **Klárgering til sýn**
- **Bremsur, útstoyt, stoytdoyvarar, rustarbeiði o.m.a.**



**Ring og fá eitt tilboð**

**Sp/f Plátuverkstaðið**
**Falkavegur · Tórshavn · Tel 321778 ella 221778**
**Teldupostur: plv@plv.fo**